# Ruðuleiki á Suðuroyar Sjúkrahúsi av verkfallinum

**– Verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum kann fáa álvarsvligar avleiðingar, tí sjúkraflutningurin er ein stórur ruðuleiki, sigur umsjónarmaðurin**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*

– Vit royna at klára okkum sum frægast. Men hetta er ein stórur ruðuleiki og tað kann fáa álvarsligar avleiðingar.

Ronnie Midjord, umsjónarmaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, er alt annað enn tryggur við støðuna, sum hon er í løtuni.

Verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum hevur nú eisini lagt sjúkraflutningin lamnan og sotatt eru skiparar og stýrimenn hjá Strandferðsluni heldur ikki tøkir til at flyta sjúklingar og læknar ímillum oyggjarnar, skuldi tað gjørst neyðugt, eitt nú av teimum smáu sjúkrahúsunum til Havnar á Landssjúkrahúsi ella vestur í Vágar, tá ið tað er neyðugt at flyta sjúklingar av landinum til viðgerðar.



*Verkfallið ger, at sjúkraflutningurin hja Suðuroyar Sjúkrahúsi er ein stórur ruðulleiki, sigur umsjónarmaðurin, Ronnie Midjord*

Hetta kom heilsuverkinum ógvuliga dátt við og síðani hava sjúkrahúsini roynt at klára seg sum frægast, eitt nú ar avtalað gjørd við Pressaran hjá Skipasmiðjuni í Havn um at flyta sjúklingar um Skopunarfjørð og við ein bát um at flyta sjúklingar um Vestmannasund.

Hetta er tó ein sera trupul støða, tí hesir bátar fáa ikki tikið sjúkrabilar.

Serliga ring er støðan kortini hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi, tí tað liggur so langt frá meginøkinum og tað er ofta ringt veður at sigla.

– Nei, vit eru alt annað enn tryggir við støðuna, sigur Ronnie Midjord, umsjónarmaður.

Hann sigur, at tey hava roynt at klára seg sum frægast við at leiga tyrluna og við at føra sjúklingar við fiskiskipum.

– Tað er akkurát, sum best ber til, men tað er ómetaliga trupult í løtuni og umstøðurnar at flyta sjúklingar við fiskiskipum eru alt annað enn góðar.

– Trupulleikin við Tyrluni er, at hon hevur so ómetaliga nógv at gera, at hon er ikki altíð tøk, uttan so at talan er um bráfeingistørv.

*Hvat siga tit so til, at Smyril liggur í Havn?*

– Tað skerst ikki burtur, at tað hevði verið ein stórur tryggleiki í at havt hann liggjandi í Suðuroy.

Ronnie Midjord sigur, at tað kann koma fyri, at tað ikki er flúgvandi við tyrluni.

– Vit høvdu eitt dømi fríggjadagin, tá ið veðrið var so ringt, at eg ivist stórliga í, um tað yvirhøvur var flúgvandi. Tíbetur hendi onki hendan dagin, men tekur ein álvarsom støða seg upp ein slíkan dag, eitt nú ein vanlukka, er tað sjálvsagt, at tað kann fáa álvarsligar avleingar, ber tað ikki til at fáa sjúklingar á Landssjúkrahúsið, ellá á Ríkissjúkrahúsið nóg skjótt.

– Tí hevði tað verið ein stórur tryggleiki í, at hann lá í Suðuroy, so at hann var tøkur, skuldi ein støða tikið seg upp, sum kravdi tað, sigur hann

### Leiga tyrluna meir

Hann sigur, at hesa tíðina, verkfallið hevur verið, hevur Suðuroyar Sjúkrahús havt sjúklingar, sum skulu á Landssjúkrahúsið og sum skulu á Ríkissjúkrahúsið.

– Men vit hava sanniliga eisini havt sjúklingar, sum skulu øvugtan veg, av Landssjúkrahúsinum ella Ríkissjúkrahúsinum og heim aftur, eftir lokna viðgerð.

Hann heldur, at tað kann hvørki góðtakast at sjúklingar ikki sleppa avstað, tá ið teir skulu, ella at teir ikki sleppa heimaftur, tá ið viðgerðin er liðug.

Men tað eru eisini aðrir trupulleikar, sum kunnu stinga seg upp.

Eitt nú er eitt tól á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum verður brúkt í sambandi við skurðviðgerðir í ólagi í løtuni.

– Mekanikari skal koma niðri frá í dag, men hann sleppur ikki suður og tí mugu vit royna at leiga tyrluna við honum.

– Eg fari tí at boða Almanna- og Heilsumálastýrinum frá, at vit vera noydd at leiga tyrluna meiri enn vit hava gjørt, eisini til sjúkraflutning har talan ikki er um bráfeingistørv, men har talan er um at fáa sjúklingar aftur og fram, antin til viðgerðar, ella heimaftur, eftir lokna viðgerð, sigur Ronnie Midjord.

# Nú kann verkfallið gerast drúgt

**– Enn er akkurát líka langt ímillum partarnar, sum tað var, tá ið vit fóru í verkfall Ellintur Abrahamsen**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*

Nú kann verkfallið hjá skiparuum og stýrimonnunum við teimum almennu skipunum, gerast drúgt.

Tað stúrir Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum, fyri, eftir at aftur ein semingsroynd miseydnaðist nú um vikuskiftið.

Tað var seinnapartin hósdagin at semingsfólkini, Fríða Patursson og Ole Guldborg Nielsen, kallaðu partarnar saman í enn eini roynd at finna eina loysn á verkfallinum, sum hevur lagt øll Strandfaraskipini, umframt skipini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og fiskirannsóknarskipið, Magnus Heinason.



*Vit góvu okkum eitt sindur,men tað hjálpti onki og vit eru enn akkurát líka langt frá hvørjum øðrum, sum vit vóru, tá ið verkfallið varð lýst, sigur Ellintur Abrahamsen*

– Kanska høvdu semingsfólkini vænta, at tað fór a bera til at finna semju, nú tað eydnaðist at finna semju við Maskinmeistarafelagið, heldur Ellintur Abrahamsen.

Men hann sigur, at semingsroyndin varð miseydnað, tí tað vísir seg, at tað er akkurát líka langt ímillum partarnar nú, sum tað altíð hevur verið.

– Eg veit ikki, hvat vit vórðu kallaðir saman til, tí tað kom onki semingsuppskot á borðið, sigur hann.

Við Útvarpið søgdu semingsfólkini, at tey kannaðu møguleikarnar í einar 12 tímar, men tá ið tað varð greitt, at partarnir ikki nærkaðust hvørjum øðrum, góvust tey, uttan at leggja nakað semingsuppskot fram.

Samstundis boðaðu tey frá, at nú fóru tey ikki at gera fleiri semingsroyndir ta fyrstu tíðina.

Ellintur Abrahamsen sigur, at nú aftur ein semingsroynd er miseydnað, kann henda, at verkfallið verður drúgt.

– Broytist støðan ikki munandi, er onki endamál at hittast aftur, sigur hann. Hann væntar tískil ikki, at semingsfólkini fara at kalla partarnar saman aftur uttan so, at onkur ávirkar tey til at gera eina roynd afturat.

### Lá langt frá

Ellintur Abrahamsen sigur, at hóast onki semingsuppskot varð lagt fram, varð kortini arbeitt við ymsum tølum.

– Men tað var framvegis so langt frá tí, sum vit kundu góðtaka, at har var onki at gera.

Hann heldur kortini, at Skipara- og Navigatørfelagið gjørdi eina roynd. Hann sigur, at felagið bjóðaði sær til at gera tvey ella trý ára sáttmála ístaðin fyri ein hálvtannað árs sáttmála, sum higartil hevur verið upp á tal.

– Í tí sambandinum bjóðaðu vit okkum til at slaka í krøvunum tað fyrsta árið uppá at fáa nakað innaftur seinni, men tað hjálpti ikki, sigur Ellintur Abrahamsen.



# Strongt netvarp

**Tað vera allarhelst bert teir skjótu og hepnu føroyingarnir uttanlands, sum fáa møguleika at hoyra Útvarp Føroya undir uppteljingini av atkvøðum í kvøld. Áhugin fyri at hoyra Útvarp Føroya ígjøgnum internetið er nevniliga so stórur, at sambandið als ikki megnar at geva øllum pláss. Ein loysn er á veg, sigur útvarpsstjórin, men í kvøld mugu teir nógvu lurtararnir stríðast um tey fáu plássini**

*Rúnar Reistrup*

Áhugin millum føroyingar uttanlands at hoyra Útvarp Føroya beinleiðis ígjøgnum internetið er vaksin nógv seinastu tíðina, og hetta hevur við sær, at tá tíðindini verða send á middegi og á kvøldi, er sambandið so mikið strongt, at tað kann vera torført at koma ígjøgnum til servaran, sum hýsir beinleiðis netvarpinum.

Av tí sama er væntandi, at tað verður ógvuliga torført hjá føroyingum uttanlands at koma ígjøgnum í kvøld, tá Útvarp Føroya fer at ramsa valúrslit upp og senda reportagur frá ymsu valdømunum, tí tá val er, plagar áhugin millum føroyingar uttanlands fyri at hoyra útvarpið heimanifrá at verða av tí størsta. Støðan er tann sama, tá útvarpið sendir frá landsdystum hjá føroyska fótbóltslandsliðnum og øðrum stórhendingum.

### Útisetar hava fast samband

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, er varugur við, at strongdin á beinleiðis varpingina á netinum nú er so mikið stór, at tað er vorðið torført hjá brúkarum at koma ígjøgnum. Hann metir eina av orsøkunum vera, at tað gerst alt meira vanligt at internetbrúkarar uttanlands hava fast internetsamband, sum er skjótt og har brúkararnir ikki gjalda fyri nýtsluna.

– Tá ber til hava sambandið opið og hoyra Útvarp Føroya allan dagin uttan at tað ger mun, og vit hava varhugan av at hetta er beinleiðis orsøkin til at strongdin á sambandið er vorðin so nógv, sigur Jógvan Jespersen.

Ein stórur partur av kollegiunum í Danmark hava slíkt fast internetsamband. Harímillum er føroyingaskansin Oyrasunds kollegie.

### Arbeiða við eini loysn

Sum er hevur servarin, sum sendir Útvarp Føroya beinleiðis ígjøgnum internetið, bert pláss fyri 60 brúkarum ísenn. Tá 60 brúkarar hava fingið samband við servaran, sleppa ikki fleiri ígjøgnum, og tí ræður um at bera skjótt av, og tendra netvarpið tíðliga, um nakar hugsingur skal vera um at vera ein av teimum 60, sum sleppa at hoyra útvarpið ígjøgnum internetið í kvøld, tá úrslitið av løgtingsvalinum verður gjørt upp.

Orsøkin til at ikki fleiri enn 60 brúkarar ísenn sleppa at hoyra útvarpið ígjøgnum netið er, sambært Arna Thomsen, netumsitara á Útvarpi Føroya, at netvarpanin er krevjandi fyri tann rættiliga avmarkaða kapasitetin á internetsambandinum millum Føroyar og útheimin.

– Tá 60 brúkarar hoyra útvarpið ísenn, so brúka teir ein munandi part av samlaða kapasitetinum á internetsambandinum við útheimin, og tí er Føroya Tele, ið hevur servaran um hendi, sum nú er, ikki sinnað at lata upp fyri fleiri enn 60 brúkarum ísenn, sigur Arni Thomsen.

Sambært Jógvani Jespersen, útvarpsstjóra, arbeiðir Útvarp Føroya við at finna eina loysn á trupulleikanum við strongdini á netvarpið. Ætlanin er, at tað innan stutta tíð skal bera til hjá nógv fleiri internetbrúkarum at hoyra útvarpið samstundis.

### Internettænsturnar væl umtóktar

Áhugin fyri internettænastunum hjá Útvarpi Føroya sum heild er sera stórur millum føroyingar uttan fyri landoddarnar, ikki minst tá val er. Hagtøl yvir tey, sum vitja vevsíðuna hjá Útvarpi Føroya, vísa, at tá útvarpið undir uppteljingini av atkvøðum til fólkatingsvalið herfyri legði valúrslitini á vevsíðuna, vóru bert helvtin av teimum vitjandi á vevsíðuni, stødd í Føroyum. Ein fjórðingur av teimum vitjandi vóru stødd í Danmark og síðsti fjórðingurin av teimum vitjandi vóru stødd aðrastaðni í heiminum. Samanlagt vóru 2.600 vitjandi tann dagin.

Síðan tá er útvarpið farið undir at leggja skrivað tíðindi á vevsíðuna, og tað hevur fingið talið á vitjandi at vaksa munandi. Og útvarpsstjórin væntar, at í dag fer talið á vitjandi at seta met.

Brúkaragjald í framtíðini

So hvørt sum Útvarp Føroya útbyggir internettænastuna, sum í stóran mun verður brúkt av føroyingum uttanlands, ið sjálvsagt ikki gjalda útvarpsgjald, reisir spurningurin seg, um tað er rætt av stovninum at brúka orku upp á annað enn at senda vanligt útvarp til føroyingar í Føroyum.

Sambært Jógvani Jespersen er eingin ivi.

- Vit síggja okkara tilboð um internetið sum eyka tænastur til tey, sum gjalda útvarpsgjald. Tað gevur fólki møguleika til at hoyra og lesa útvarpstíðindini óheft av um tey hava møguleika at lurta júst tá tey verða send yvir vanliga sendinetið. Viðvíkjandi teimum, sum ikki gjalda útvarpsgjald, so er ætlanin at tey í framtíðini, tá tøknin gevur betri møguleikar fyri tí, skulu gjalda fyri tænasturnar. Men í løtuni eru vit í einari royndartíð hvat hesum viðvíkir, sigur Jógvan Jespersen.

Í kvøld kunnu teir 60 internetbrúkararnir, sum fáa atgongd til servaran og hoyra frásøgnina frá løgtingsvalinum, so gleðast um at tað enn er ókeypis at hoyra útvarpið á netinum. Tey, sum ikki sleppa framat, mugu vóna, at tað í framtíðini verður pláss til fleiri á servaranum.


